# AKADEMIMERKONOM
## - nýggj útbúgving

Team85 • 358000

Nýggj AkademiMerkonom útbúgving byrjar á sumri 2003 á Føroya Handilsskúla. Henda útbúgvingin er ein uppstigan av "gomlu" Merkonom útbúgvingini. AkademiMerkonom er ein akademi-útbúgving, sum er útbúgvingarstigi beint undir bachelorstigi.
Í hesi nýggju Akademiskipanini eru møguleiki fyri fyribils at velja millum 4 breytir. Hesar eru:

- Altjóða Handil og Marknaðarførsla
- Búskapur- og Ressoursustýring
- Samskifti og Formidling
- og Leiðsla.

Fleiri upplýsingar eru at finna á heimasíðu Føroya Handilsskúla á www.fh.fo. Møguleiki er eisini at fáa upplýsingar um Akademimerkonom-útbúgvingina á heimasíðuni hjá Undervisningsmisteriet www.uvm.dk. Millum annað eru upplýsingar at finna um avriksflutning frá gomlu merkonom útbúgvingini til akademimerkonom útbúgvingina.

**Tórshavn**

| | | |
|---|---|---|
| *** Søla og marknaðarførsla (afsætning) | mikud. | 18.00-21.30 |
| *** Vinnubúskapur | mánad. | 18.00-21.30 |

**Kambsdalur**

| | | |
|---|---|---|
| *** Altjóða búskapur | mikud. | 18.00-21.30 |
| *** Vinnubúskapur | mánad. | 18.00-21.30 |

**Upptøkutreytir**

1) Viðkomandi yrkisútbúgving við lærugreinunum Enskt C og Støddfrøði C / Virkisbúskapur C (t.d. útbúgving innan skrivstovu, handil ella handverk)
2) Viðkomandi grundútbúgving fyri vaksin við lærugreinunumm Enskt C og støddfrøði C ella Virkisbúskap C (t.d. tikin á VUC í DK)
3) Miðnámsútbúgving, antin við støddfrøði C ella Virkisbúskapi C
4) Onnur viðkomandi útbúgving svarandi til støði nevnt í pkt. nr. 1 – 3.

Stk. 2. Umsøkjarin skal hava minst 2 ára viðkomandi vinnulívsroyndir aftaná at hava lokið miðnámsútbúgving
Stk. 3. Skúlin kann taka upp umsøkjarar, sum ikki uppfylla upptøkukrøvini í stk.1, har útbúgvingartreytirnar hjá umsøkjarinum kunnu javnmetast við omanfyrinevndu krøv og treytir.
Um áhugin er nóg stórur, ber til at fylgja lærugreinum, sum verða boðin út aðrastaðni (antin í havn ella á Kambsdali). Henda undirvísing fer fram um videoráðstevnu. Tey, sum hava áhuga í hesum, skulu melda seg til í økinum, har tey búgva , men viðmerkja, at tey ynskja at fylgja undirvísingini um videoráðstevnu.

## "Gomul" Merkonom útbúgving

Føroya Handilsskúli ætlar ikki at halda fram við "gomlu" Merkonom útbúgvingina, men tó verða nakrar lærugreinir, sum serstakur tørvur og áhugi hevur verið fyri, framhaldandi boðnar út. Hesar eru:

**Tórshavn**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mikud. | 18.00-20.30 |
| * Skattarættur II | mánad. | 18.00-20.30 |
| * Innovatión | hósd. | 18.00-20.30 |
| **Starvsfólkamenning | mikud. | 18.00-20.30 |
| * Arbeiðsrættur | týsd. | 18.00-20.30 |

**Kambsdalur**

| | | |
|---|---|---|
| * Skattarættur II | mánad. | 18.00-20.30 |

**Klaksvík**

* Greining og fígging
* Virkisfyriskipan

Tíðirnar verða ásettar saman við teimum lesandi fyrsta undirvísingarkvøld (eftir nærri boðum).

**Suðuroy**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mánad. | 19.00-21.30 |
| * Virkisbúskapur | mánad. | 20.30–22.00 |

**Vágar**

| | | |
|---|---|---|
| * Leiðsla og samstarv | mánad. | 18.00-20.30 |
| * Innleiðsla til virkisbúskap | mánad. | 20.30–22.00 |
| * Almenn Marknaðarførsla | mikud. | 18.00-20.3 |

Ætlanin er at bjóða lærugreinina Virkisbúskap út eftir jól.

**Vanligar fortreytir, Merkonom:**
Útbúgving á handils- og skrivstovuøkinum. Hetta umfatar til dømis:
- Lærlingaútbúgving á handils- og skrivstovuøkinum
- FHS við vinnuroyndum í minst tvey ár
- HH við vinnuroyndum í minst eitt ár. **Ella**
- At umsøkjarin hevur aðra fakliga útbúgving. **Ella**
- At umsøkjarin hevur relevantar vinnuroyndir í minst tvey ár, og skúlin metir hann at vera egnaðan.

**Serligar fortreytir:**
· Grundlærugreinirnar: ongar, uttan í Virkisbúskapi
· Starvsfólkamenning : krevst at tú hevur verið teknað/ur og verið til próvtøku í Arbeiðsrætti, Leiðsla og samstarv, Starvsfólkafyrisiting.

**Ivast tú, ring og spyr eftir vegleiðara.**

## Staklærugreinar:

**Tórshavn:**
Stakroyndir (FHS)

| | | |
|---|---|---|
| Enskt C | hósd. | 18.00-20.30 |
| Virkisbúskapur C | mikud. | 18.00-20.30 |
| Kunningartøkni C | mána- og mikud. | 20.30-22.00 |
| Marknaðarførsla C | mánad. | 18.00-20.30 |

***Próvtøkur í mars/apríl 2004***

Hægri stakroyndir (HH)

| | | |
|---|---|---|
| Støddfrøði B | hósd. | 18.00-21.20 |
| Virkisbúskapur B | mikud. | 18.00-21.20 |

***Próvtøka í mai/juni 2004***

**Kambsdal:**
Stakroyndir (FHS)

| | | |
|---|---|---|
| Virkisbúskapur C | mikud. | 18.00-20.30 |
| Kunningartøkni C | mánad. og mikud. | 20.30-22.00 |
| Marknaðarførsla C | mánad. | 18.00-20.30 |
| Enskt C | mánad. | 20.30-22.00 |

***Próvtøkur í mars/apríl 2004***

Hægri stakroyndir (HH)

| | | |
|---|---|---|
| Virkisbúskapur B | hósd. | 18.00-21.20 |

**Um pláss er, kunnu aðrar staklærugreinar á FHS og HH takast á dagskúlanum. Áhugaði skulu venda sær til skúlan í Havn ella á Kambsdali.**

**Kostnaður:** (Øll undirvísing er treytað av nóg stórari undirtøku )

| | | | |
|---|---|---|---|
| **FHS-stakroyndir, innskrivingargjald** | **kr. 350,00** | **Merkonom, luttøkugjald 45 t. lærugrein (*)** | **kr. 450,00** |
| **HH-stakroyndir, innskrivingargjald** | **kr. 350,00** | **Merkonom, luttøkugjald 90 t. lærugrein (**)** | **kr. 900,00** |
| **AkademiMerkonom, lærugrein (***)** | **kr. 1.500,00** | **Depositum: kr. 250,00 fyri hvønn persón.** | |

Freistin at tekna seg til undirvísingina er 8. august 2003. Skúlagongdin byrjar í viku 36

**Umsóknarbløð:**
Umsóknarbløð eru at finna á heimasíðu handilsskúlans www.fh.fo. Eisini er møguligt at fáa umsóknarbløð við at ringja til handilsskúlan í Havn, tel 317177, ella á Kambsdali, tel 444900.

Skúlin er stongdur vegna summarfrí frá 4. juli til 11. august.

# FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postrum 177, 110 Tórshavn, Tel 317177, Fax 313374
Kambsdalur - 530 Fuglafjørður - Tel 444900 - Fax 444901 - www.fh.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3582
**Navn:** Sp/f Ritunøvan
**Adressa:** 350 Vestmanna.
**Kommuna:** Vestmanna Kommuna
**Stovningardato:** 16.06.2003
**Viðtøkudato:** 16.06.2003
**Kapitalur:** Kr. 241.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 241.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Hákun Súni Egilsbnes, 350 Vestmanna og Ivan Fróði Egilsbnes, 350 Vestmanna.
**Stjórn:** Hákun Súni Egilsbnes, 350 Vestmanna og Ivan Fróði Egilsbnes, 350 Vestmanna.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjórnini.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at teka fiskivinnu, útleigan, keyp, søla og og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 19. juni 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3580
**Navn:** Sp/f ROJH
**Adressa:** 485 Skálafjørður.
**Kommuna:** Skála Kommuna
**Stovningardato:** 24.05.2003
**Viðtøkudato:** 24.05.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Óluva J. Midjord, 485 Skálafjørður og Regin Borðoy, 485 Skálafjørður.
**Stjórn:** Óluva J. Midjord, 485 Skálafjørður.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f Revisión, v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 24.05.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka keyp, søla, service, handverk, graviarbeiði, eiga og reka fasta ogn og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 19. juni 2003*

*Kristin Balle*




# Føroya Handilsskúli søkir eftir stjóra

Eitt sera fjølbroytt og spennandi starv sum stjóri á Føroya Handilsskúla er leyst at søkja. Stjórin skal virka fyri at røkka hugsjónum skúlans um Føroya Handilsskúla sum merkantilan vitanardepil og harumframt standa á odda fyri øllum undirvísingarvirksemi, ið fer fram á skúlanum. Starvið verður sett 1. september ella skjótast til ber eftir tað.

**Nakrar av høvuðsuppgávum stjórans eru:**
- At hava námsfrøðiligu leiðsluna á skúlanum
- At hava fíggjarligu og umsitingarligu leiðsluna
- At hava dagligu leiðsluna á deildini í Tórshavn
- At menna virksemið við at fremja menningarætlan skúlans, her í millum útboðið av ymsum útbúgvingum og at fremja møguligar bygnaðarbroytingar
- At samstarva við aðrar miðnámsskúlar til tess at finna felags loysnir sum heild, eitt nú í sambandi við komandi skúladepil við Marknagil
- At umboða skúlan úteftir
- At tryggja javnan fíggjarligan vøkstur

**Førleikakrøv:**
**Vit vænta okkum m.a. at umsøkjararnir hava:**
- Útbúgving á kandidatstigi ella javnbjóðis útbúgving
- Leiðsluroyndir frá tí almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum
- Góð leiðslu- og samstarvsevni, umframt mennandi leiðslustíl
- Førleika at menna samstarvið við myndugleikar, vinnulívið og aðrar áhugabólkar
- Vilja og evnir at royna nýggjar leiðir
- Førleika at orða seg væl á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Fyrimunur er, um umsøkjararin hevur hóskandi undirvísingarroyndir.

**Dentur verður harumframt lagdur á, at viðkomandi:**
- Dugir væl at samskifta og at nýta KT
- Dugir væl at samskipa og raðfesta arbeiðsuppgávur
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Hevur virðing fyri og dugir at fáast við fólk

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt ájavnt 35. lønarflokki eftir sáttmálanum hjá HL við eini árligari viðbót, umframt eftirløn. Stjórin hevur undirvísingarskyldu, ið Mentamálaráðið ásetur nærri um. Hon er í løtuni 7 lønartímar um vikuna. Um tann, ið settur verður, ikki hevur námsfrøðiliga útbúgving frammanundan, skal hon verða lokin eftir tveimum árum. Tað er landsstýrismaðurin í undirvísingar- og mentamálum, sum setir starvið eftir tilmæli frá stýri skúlans.

**Umsókn:**
Umsókn við CV og avriti av próvskjølum skal stílast til Mentamálaráðið og sendast Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegur 77, postsmoga 177, 110 Tórshavn, t-postur: hsh@hsh.fo, so hon er skúlanum í hendi í seinasta lagi 14. juli 2003. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til stjóran á Føroya Handilsskúla Ragnar Magnussen tlf. 317177 / 217177, ella stýrisformannin, Ólav Gregersen, tlf. 223978. Allir fyrispurningar um starvið vera í trúnaði.

Sansir 355 355

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Føroya Handilsskúla · Marknagilsvegur 77 · Postsmoga 177 · 110 Tórshavn · T-postur: hsh@hsh.fo · www.fh.fo

Føroya Handilsskúli er ein stovnur í støðugari menning. Skúlin er sjálvsognarstovnur, ið er skipaður í tríggjar høvuðsdeildir, sum eru deildin í Tórshavn og á Kambsdali, sum fyrst og fremst hava miðnámsútbúgvingarnar, FHS og HH, og Menningardeildin, sum rekur menningarvirksemi, t.d. samstarv við fróðskaparsetur uttanlands. Skúlin hevur eisini deildir í Klaksvík, Vágum og Suðuroy. Á Føroya Handilsskúla ganga umleið 200 næmingar á Hægri Handilsskúla (HH) og 200 á Fyrisiting, Handli og Skrivstovu (FHS). Í Havn starvast um 35 og á Kambsdali 20 lærarar. Samanlagt starvast um 80 fólk á skúlanum. Umframt HH og FHS skipar Føroya Handilsskúli fyri kvøldskúla og framhaldsútbúgvingum, so sum teldustøðingaútbúgving, Master of Management, HD, datanom og merkonom. Føroya Handilsskúli og Tekniski skúli í Tórshavn samstarva um Skeiðsdepilin.



www.sosialurin.fo



# ALMANNASTOVAN

## Sosialráðgevi

Søkt verður eftir sosialráðgeva til økisdeildini í Suðuroy at arbeiða fulla tíð frá 1. august at rokna ella skjótast tilber eftir henda dag.

**Um deildina.**
Á økisdeildini á Tvøroyri arbeiða 4 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøki hjá deildini er at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuna
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Økið hjá deildini er Suðuroy.

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av eru
- ymiskar fyriskipanir forsorgarlógini, sum landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni ikki hava ábyrgdina av
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- sosialráðgevaraútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til John Mortensen, deildarleiðara á tlf. 371620.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, postsmoga 196, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 1. juli 2003.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Eysturskúlin**
Í Eysturskúlanum eru 610 næmingar og har starvast 50 lærarar.

Skúlin er tann størsti í landinum, næstan 6.000 fermetrar. Skúlin er mest í einari hædd og er tí vítt um at fara.

Í skúlanum eru allar fakstovur og serlig málstova, sum er sera væl egnað í fremmandamáls undirvísingini.

Skúlin hevur svimjihyl og fimleikahøll.

Www.torshavn.fo

## Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Eysturskúlan at arbeiða fulla tíð.

**Arbeiðið umfatar**
Vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

**Førleikaprógv**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. september 2003. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Eyðdis Eidesgaard tlf. 31 47 52 ella Jákup Simonsen,deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. juli 2003.